# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Obama sjálvandi

Kann ein forseti í einum krígsførandi landi fáa friðarheiðursløn Nobels! Hendan spurning hava ikki heilt fáir eygleiðarar sett, nú tað varð kunngjørt, at Barack Obama, forseti fær friðarheiðursløn Nobels. Hetta er sjálvandi ein viðkomandi spurningur at seta og fyri alt tað verða mangan settir spurningar við hesa heimsins mest tignarligu heiðursløn.

Spurningurin hevur nakað at gera við, at nógv halda friðarheiðursłønina til tíðir hava politiskar undirtónar og nakað er tað ivaleyst um hetta páhald. Mangan er heiðurslønin farin til ein persón ella felagskap sum hava staðið í hørðum stríði fyri fólkaræði og mannarættindi, ella sum hava havt sermerktan leiklut í samband við at fáa enda á einum kríggi. Ásannast má, at tað ikki altíð hava verið Guds bestu børn, ið hava fingið heiðurslønina, men vit kunnu ikki annað enn samstundis ásanna, at viðkomandi veruliga hevði útint stórverk fyri friðin á einum ávísum øki. Kissinger og Le Duc To munnu vera bestu dømini. Hvørgin teirra var nakað friðardýr og báðir høvdu nógv ódámligt á samvitskuni. Men høvdu meira enn aðrir einstaklingar heiðurin av, at endi fekst á Vietnamkríggið, og høvdu tí heiðurin uppibornan. Í hesum skal ásannast, at flestu heiðurslønarevni hava verið so uppløgd, at tað einasta ein kann finnast at er, at tað tók so drúgva tíð, áðrenn avgerð fall. Mandela vera besta dømið um tað.

Tað er tí einki ódámligt í, at heiðurslønin verður nýtt til at stuðla ella skunda undir eina tilgongd, ið gagnar pørtum av mannaættini ella allari mannaættini. Hetta sampakkar væl við ætlan Alfred Nobels, ið stovnaði heiðurslønina og lat norska stórtinginum upp í hendi eina ferð um árið at finna ein persón ella ein felagskap, ið kundu metast verd at fáa hendan stóra heiður. Lagt kann verða afturat, at norska nobelnevndin sum heild hevur havt hepna hond við tilnevningum sínum hesi ár heiðurslønin hevur verið til.

Obama er eitt upplagt evni til heiðursløn Nobels. Víst er hann forseti í krígsførandi landi, men hann hevur "arvað" hesi kríggj og hevur sjálvsagt ongan møguleika at enda hesi kríggj eftir einum degi. Hann fær heiðurslønina fyri eftir stuttari tíð at hava megnað at broyta altjóða politiska veðurlagið. Amerikanskur uttanríkispolitikkrur hevur øll árinini undir Bush verið eyðkendur av konfrontatión og hernaðarligum loysnum. Hesin harðrendi politikkur hevur elvt til ófrið og spenning í heiminum og hevur drenað USA fyri búskaparliga orku og tilfeingi. Obama hevur eftir stuttari tíð broytt hendan myndil og framt aldarinnar paradigmuskifti í amerikanskum politikki. USA er á veg úr tí politiska kyksendi, sum politikkur Bush hevur elvt til og myndin av einum demokratiskum og ábyrgdarfullum stórveldi hómast aftur.

Obama hevur við øðrum orðum givið landsmonnum eins væl og altjóða samfelagnum nýggjar vónir um ein heim við einum rættvísari býti og ein heim, har ósemjur landa millum kunnu verða loystar við diplomatii heldur enn við vápnamegi. Obama er tí eitt gott og upplagt val, ið tænir norsku nobelnevndini til heiðurs.

**Sosialurin**

## Nei Kaj

**MAUD WANG HANSEN**



Nú er nóg mikið sagt um, hvat onnur skulu gera fyri at fáa kassan at ganga upp.

Aftur nú eru álop móti teimum alment løntu, og hesa ferð frá sjálvum løgmanni. Eg var ikki sørt skelkað, tá eg hoyrdi hesa hørðu røddina í útvarpinum, og eg havi ikki hoyrt løgmann illan fyrr. Eg skilji als ikki álopið heldur.

Tað, løgmaður ger, er, at hann leggur eitt trýst á øll alment lønt starvsfólk og skýrir tey ikki at vísa samfelagssinni ella samhaldsfesti. Eg ímyndi mær, at øll, sum hoyrdu hetta álopið, fáa eina keðiliga kenslu mótvegis alment løntum. Tað er manga staðni so, at fólk halda, at alment lønt eru tey, sum arbeiða í Havn, og at hesi hava eina so høga løn, at tey áttu at skamma seg fyri ikki at lata ein part av henni til aðrar samfelagsbólkar.

Rættiliga stórur partur av teim alment løntu eru kvinnur við lítlari ella ongari útbúgving. Nógvar av hesum kvinnum eru stakir uppihaldarar; og mánaðarliga byrjunarlønin fyri eitt fulltíðarstarv hjá hjálparfólki í Pedagogfelagnum er 18.273 kr um mánaðin. 2/3 av øllum starvsfólkunum á landsins dagstovnum eru hjálparfólk. Fyri ein námsfrøðing, sum hevur nomið sær eina 3½ ára langa útbúgving, er byrjunarlønin 22.934 kr. Hetta er sambært seinstu lønarhækking, sum kom í gildi tann 1. oktober 2009. Nógvar av hesum kvinnum hava ikki møguleika at fáa eina fulla mánaðarløn, tí tað eru so fá fulltíðarstørv. Sostatt mugu tær ofta klára seg við einari løn svarandi til 75%.

Tað eru ikki fakfeløgini, sum hava strongt á fyri at fáa ein 4 ára sáttmála í hús. Tað var álagt feløgunum at skriva undir longri sáttmálar, enn feløgini eru von við, og eisini longri, enn ráðiligt er. Sum plástur á sárið fingu feløgini í boði, at samráðingar kundu takast upp í sáttmálaskeiðnum, um mett var, at prísvøksturin var ov høgur í mun til lønarkarmin. Oljuprísurin fór upp í topp, og kostnaðurin á húsarhaldsvørum fór upp við fleri prosentum. Tá so roynt varð at samráðast um eina regulering av lønini, varð hurðin latin aftur.

Nú hava politisku raðfestingarnar - ella manglandi raðfestingar - sett tey fólkavaldu skák mát, og meina tey nú, at løntakarin hjá tí almenna skal gjalda fyri teirra mistøk. Lættari hevði verið at funnið ein samhaldsfastan anda millum fakfeløgini og politisku skipanina, um ynski vóru gingin á møti báðar vegir. Tá ið samráðst var um ein møguligan lønarniðurskurð, vóru eingi lyfti givin um, hvat ein møguligur lønarniðurskurður skuldi brúkast til. Um pengarnir fóru til sosialar tænastur ella velferðartænastur ella til tunnlar. Tí var eingin áhugi fyri hesum.

Kostnaðurin fyri at liva í Føroyum og forsyrgja sær og sínum børnum er methøgur. Neyvan er nakar gulldansur í heimunum hjá einum vanligum alment løntum løntakara. Eg vil her vísa á, at sparingar, sum longu eru farnar fram á hugsandi og óhugsandi økjum á almenna økinum, eisini tyngja húsarhaldini hjá fleiri av hesum somu løntakarum. Tey, sum hava børn við breki, tey, sum hava tørv á dýrum heilivági, tey, sum hava sukursjúku, og tey, sum eru fyritíðarpensjonistar, ja eg kundi blivið við.

So góði Kaj, tak nú í egnan barm fyrst og hugsa um, hvør tað er, sum ber tær høgu almennu lønirnar, er tað tú ella mamman við trimum børnum, sum arbeiðir sum hjálparfólk á einum dagtovni?

## Rættleiðing

**BOGI HANSEN**



Á forsíðuni á Dimmu 8 oktober stendur mynd av mær, og yvir henni stendur við feitum stavum: "Uppskot hjá Anniku HEIT LUFT". Eg skilji, at tey flestu uppfata hetta, sum at eg skal hava kallað nýggja lógaruppskotið hjá Anniku Olsen um veðurlagspolitikk heita luft. Tað havi eg mær vitandi ikki. Tey, sum lósu sjálva greinina inni í blaðnum, hava sæð, at eg helt uppskotið vera óambitiøst, og at partar av tí áttu at verið broyttir. Men eisini, at hetta er ein framgongd innan føroyskan politikk á økinum, serliga um tað er fyrsta stigið. Eg hugsi, at ein tílík yvirskrivt kann selja nøkur fleiri eintøk av Dimmu; men hon ger neyvan nógv annað gott. Næstu ferð, tit á Dimmu vilja hava eina tílíka yvirskrivt á forsíðuna, mæli eg til, at tit seta hana saman við eini mynd av blaðmanninum, ritstjóranum ella viðkomandi, sum fann upp á yvirskrivtina; ikki onkrum heilt øðrum.

**P.S.** Eg vildi helst havt hesa rættleiðingina í Dimmu; men teir vildu tíverri ikki prenta hana.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.